# HEVUR TÚ TROLIÐ ÚTI?

## KOM Í SAMSTARV VIÐ OKKUM

**FYRISITING**
- HR, GDPR, LØGFRØÐI, TRYGGINGAR, LØNIR

**FÍGGJARDEILD**
- FÍGGJARSTÝRING, BÓKINGAR AV INN/ÚTGJØLDUM

**SØLUDEILD**
- SØLA, MARKNAÐARFØRING, LOGISTIKKUR & VØRUSTREYMSAMSKIPAN

**MENNINGARDEILD**
- VIRKIS- & VØRUMENNING

**FRAMLEIÐSLA**
- PRODUKTIONSFLOW- & OPTIMERING

**GÓÐSKUDEILD**
- TRYGGJA RÁVØRUGÓÐSKU, SÝNISTØKA, EFTIRLIT- OG KANNINGAR VIÐ REINFØRI
- HEILSA, TRYGD & UMHVØRVI

**TEKNISKADEILD**
- ÁBYRGD AV MASKIN & EL SKIPANUM Í VIRKINUM & KT-SKIPANUM

VARÐIN PELAGIC

Varðin Pelagic ynskir at byggja brýr ímillum vinnulívið og útbúgvingarstovnar. Eitt samstarv kann skapa møguleikar fyri báðar partar. Vit ynskja at hava ein virknan leiklut fyri at menna føroyska samfelagið.



Varðin Pelagic ynskir samstarv við lesandi á miðnám-, bachelor- og kandidatstøði, umframt, ph.d. lesandi o.ø. Hetta samstarv skal stuðla undir nýskapan og vitanardeiling innan okkara virksemi, ið fevnir um pelagiska framleiðslu og vinnuvirksemi á altjóða marknaðinum.

**Hetta kunnu vit bjóða tær:**

- Tú fært møguleikan at skriva tína bachelor- ella fráfaringaruppgávu í samstarvi við okkum, har tú arbeiðir við ítøkiligum avbjóðingum, ið Varðin Pelagic stendur yvirfyri.
- Kom í starvvenjing, har tú fært hands-on royndir og kanst brúka tína teoretisku vitan í praksis.
- Tú kemur at luttaka í ítøkiligum verkætlanum hjá Varðanum Pelagic, ið eru viðkomandi fyri tína útbúgving.
- Tú fært møguleikan at samstarva við okkum í ávísum skeiðum.
- Tú kemur at netverka, bæði innan- og uttanlands.



Um hetta hevur tín áhugað, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við:

**Annika Nolsøe**
+298 291687 / anno@vardin.fo

**Rógvi Joensen**
+298 291693 / rojo@vardin.fo

## Stutt um Varðan Pelagic

Varðin Pelagic er eitt nýmótans uppisjóvarvirki, ið virkar pelagiskan fisk, t.e. makrel, sild, svartkjaft og lodnu, til tann altjóða marknaðin. Tann árliga framleiðslan er ímillum 65.000 – 100.000 tons. Varðin Pelagic er eitt framkomið og fjøllbroytt arbeiðspláss við kunnleika innan eina røð av fakøkjum: fyrisiting, fríggjardeild, søludeild, menningar-deild, framleiðsludeild, góðskudeild og tekniska deild.




SKANNA
MEG
↓

VARÐIN
PELAGIC


Varðin Pelagic
Havnarlagið 11
800 Tvøroyri
www. vardin.fo


www.sansir.fo